

# EG REISI MEG ALTÍÐ

**- Tað er ótrúliga irreterandi, men eg eri ikki soleiðis, at eg fari út og geri uppreistur, bara tí eg siti á beinkinum. Hinvegin havi eg áður sitið uttanfyri í longri tíðarskeið, men eg komi altíð á vøllin aftur, sigur Christian Lamhauge Holst, sum seinastu dystirnar hevur byrjað á beinkinum, bæði í Silkeborg og á landsliðnum**

Rólant Waag Dam

Í farnu viku skoraði Christian Lamhauge Holst helst skjótasta málið, sum nakrantíð er gjørt í donskum toppfótbólti. 11 sekund vóru gingu, frá tí dysturin varð bríkslaður í gongd, til Holst hevði sett bóltin í kassan. Seinni í steypakappingardystinum ímóti B93 legði føroyski landsliðsleikarin upp til annað mál.

Seinnapartin í gjár staðfesti Holst 3-1 sigurin hjá Silkeborg á OB.

Tað ljóðar sum ein fín vika og tað er tað í ein vissan mun eisini. Hinvegin er tað ein sannroynd, at Christian Lamhauge Holst ikki er inni í hitanum hjá venjarum sínum. Fyrst setti Brian Kerr Holst av liðnum, tá føroyska landsliðið skuldi dystast við Italiu. Afturkomin til Danmarkar gjørdi Troels Bech, venjari hjá Silkeborg, júst tað sama og lat hann sita uttanfyri, tá Silkeborg skuldi dystast við FCK.

Tveir stórir dystir, har venjararnir høvdu størri álit á øðrum monnum enn Christian Lamhauge Holst.

- Tað er avgjørt ikki tað feitasta. Ja, fyri at siga sum er, so er tað ótrúliga irreterandi. Tað er ikki nakað, sum styrkir sjálvsálitið og tað steðgar persónligu menningini, sigur Christian Lamhauge Holst. Har er eingin ivi um, at honum ikki dámar leiklutin sum eykaleikari. Á føroyska landsliðnum hevur hann seinastu árini talst millum álitini. Í Silkeborg hevur hann eisini havt ein týðandi leiklut.

- Men eg havi helst verið og óstøðugur. Tískil hevur eitt spark í gumpin helst verið neyðugt hjá mær, metir Christian Lamhauge Holst.

### Framvegis á beinkinum

Eftir at hava sitið á beinkinum móti FCK, byrjaði Holst inni í steypakappingardystinum móti B93, har hann eisini skoraði tiltikna málið. Troels Bech hevði tó ikki valt sterkastu uppstillingina henda dagin, og hóast bæði mál og assist móti B93, byrjaði Holst á beinkinum í gjár.

- Men eg kom so á vøllin, skoraði eitt mál og royni soleiðis at spæla meg inn aftur. Eg eri ikki soleiðis, at eg fari út og geri uppreistur, tí eg ikki byrji inni. Eg havi eisini áður sitið á beinkinum í longri tíðarskeið, men eg komi altíð aftur á vøllin, sigur føroyski landsliðsleikarin, sannførdur um, at hann nokkk skal koma upp í part aftur.

### Eg skal altíð prógva okkurt

Spurdur, um hann følir á sær, at hann hevur nakað hann skal prógva og at tað er tí, at hann hevur skorað tveir dystir á rað, svarar Holst, at tað ger hann.

- Men soleiðis havi eg tað altíð. Byrji eg inni, so havi eg nakað at prógva, og byrji eg uttanfyri eins og nú, so havi eg okkurt annað at prógva, ger Christian Lamhauge Holst greitt.

*rolant@sosialurin.fo*

## Atli sigraði aftur

Tað tykist av álvara at vera komið glið á hjá FC Roskilde og Atla Danielsen, sum seinnapartin í gjár vunnu á Viborg. Talan gjørdist um 3-1 sigur í Roskilde, og tók klaksvíkingurin hornaspark, sum førdi til eitt av málunum hjá FC Roskilde. Eins og vanligt, spældi føroyski miðvallarleikarin allan dystin á miðvøllinum.

Hetta er annar dysturin á rað, at Atli Danielsen og liðfelagar hansara fara av vøllinum sum sigursharrar. Tey trý stigini hava við sær, at FC Roskilde er komið uppá átta stig og er liðið harvið leyst frá hinum botnliðunum, sum eru Viborg, Hvidovre og FC Fyn. Hinvegin eru tað trý onnur lið, ið hava sama stigatal sum FC Roskilde. Hesi eru Brønshøj, Kolding FC og Næstved.

# Holst gleðir seg til venjingina

**- Tað er himmalvíður munur at koma til venjing ein mánadag, tá vit hava vunnið heldur enn tapt dagin fyri, fortelur Christian Lamhauge Holst**

Rólant Waag Dam

Fyrsti sigurin hetta kappingarárið gjørdist veruleiki hjá Silkeborg í gjár.

- Tað er einastandandi, og tað er eisini so ónatúrliga umráðandi. Kensluna eftir ein sigur, hevði eg næstan gloymt, hvussu føldist, men tað kennist sera væl. Eisini uttan mun um tú byrjaði inni ella ei, segði sera fegni Christian Lamhauge Holst eftir sigurin í gjár.

Tað eru í roynd og veru fleiri mánaðir síðani, at Silkeborg vann ein landskappingardyst seinast.

- Seinasta tíðin hevur verið hørð. At møta til venjing tap eftir tap, er lítið hugaligt. Vit hava eisini verið langt niðri, men seinastu tíðina hevur ein sigur verið ávegis. Nú ræður tað um, at halda gongdini, tí tapta vit fimm teir næstu dystirnar, so er akkurát einki vunnið, slær Christian Lamhauge Holst fast.

Stig eru eisini umráðandi, um Silkeborg ynskir at hála seg úr botninum. Eitt stað, har Silkeborg als ikki hoyrir heima, sambært Christian Lamhauge Holst.

- Sjálvandi eru vit betri enn botnurin, og ja, eg meti eisini, at eg eri betri enn bonkurin, svarar ChristianLamhauge Holst flennandi, tá hann verður spurdur um hetta.